
Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE SAFETY AUTHORITY

Kunningarblað

Arbeiðstongdur kriminalitetur, tránýtsla av arbeiðsmegi og trygd á arbeiðsplássum

Anniina Jokinen
Natalia Ollus



INTEGRATE
Integrative approaches to labor exploitation and work-related crime: knowledge translation, transfer and exchange in the Nordic context

Nordic Council of Ministers

HEUNI
The European Institute for Crime Prevention and Control, affiliated with the United Nations

Fafo

Lund University
Sociology of Law Department
Faculty of Social Sciences

Kunningarblað

Arbeiðstongdur kriminalitetur, tránýtsla av arbeiðsmegi og trygd á arbeiðsplássum

Hvørji eru høvuðshugtøkini?

ARBEIÐSTONGDUR KRIMINALITETUR sipar til lógarbrot í sambandi við arbeiði og arbeiðsmarknaðin. Hetta fevnir um tilvitaðar handlingar, har arbeiðsgevarar – einsamallir ella í samstarvi við onnur – bróta arbeiðstongdar lógir, reglur og sáttmálar, og har hetta hevur skaðiligar fylgjur fyri løntakarar, aðrar fyritøkur ella tað almenna. Arbeiðstongdur kriminalitetur fevnir um tránýtslu av arbeiðsmegi, kappingaravlaging og viknan av samfelagsskipanum. Arbeiðstongdur kriminalitetur kann fevna um ymisk lógarbrot, so sum menniskjahandil við arbeiðstakarum, tránýtslu av arbeiðsmegi, lønarstuldur, mannamun og kroysting á arbeiðsplássinum. Talan kann eisini vera um arbeiðstongd lógarbrot so sum skattasvik, svik við almannaveitingum, fíggjarligan kriminalitet, hvítvasking av peningi umframt brot á arbeiðsumhvørvislóggávuna og arbeiðsrætt.

TRÁNÝTSLA AV ARBEIÐSMEGI sipar til støður, har grundleggjandi rættindi og reglur hjá arbeiðstakarum verða brotin. Hetta kann snúgva seg um ov langar arbeiðsdagar, ov lítla ella onga løn, ótrygt arbeiðsumhvørvi ella frælsisskerjing, stundum saman við hóttanum, harðskapi ella skuldabinding. Endamálið við tránýtsluni er at fáa størstan møguligan vinning við at seta virðing, heilsu og sjálvræði hjá arbeiðstakarunum til síðis. Tey mest álvarsligu dømini um tránýtslu av arbeiðsmegi eru at meta sum menniskjahandil.

Hvat er tránýtsla av arbeiðsmegi og hvat er grundarlagið undir hesum vinnuhátti?

TRÁNÝTSLA AV ARBEIÐSMEGI byrjar ofta við villleiðing ella sviki í sambandi við útvegan av arbeiðstakarum, har arbeiðstakarin fær lovað eitt væl lønt og eftir øllum at dáma lógligt starv. Arbeiðstakarin kann eisini verða kravdur at rinda eina stóra upphædd fyri at verða settur í starv og setur seg tí í skuld til arbeiðsgevaran. Arbeiðstakarin kann tí verða noyddur at verða verandi í starvinum fyri at rinda hesa skuldina. Arbeiðsgevarar kunnu eisini nýta aðrar ræðishættir, so sum hóttanir ella at leggja hald á ferðaskjølini hjá arbeiðstakaranum. Arbeiðið kann eisini vera fullkomiliga lógligt og arbeiðstakarin kann hava neyðug uppihalds- og arbeiðsloyvi, umframt eina skrivliga starvsavtalu. Í veruleikanum kunnu arbeiðsviðurskiftini tó vísa seg at vera øðrvísi enn á pappírinum: Arbeiðstakarin fær ikki lógarkravdu lønina, arbeiðstíðin er órímiliga long, trygdarreglur verða ikki hildnar, og arbeiðsgevarin hevur eitt vald yvir arbeiðstakaranum á ein hátt, ið forðar viðkomandi í at gevast í starvinum.

Tránýtsla av arbeiðsmegi byggir á ein vinnuhátt, har arbeiðsgevarar tilvitað royna at fáa sum mest burtur úr arbeiðstakarunum til egnan fyrimun ella fíggjarligan vinning. Hesin vinnuháttur er vanliga bygdur á tveir høvuðshættir: at minka um útreiðslurnar og at skapa eyka inntøkur. Útreiðslurnar verða minkaðar við til dømis at rinda ov lítið ella ikki rinda løn, krevja ov langar arbeiðsdagar, ikki fylgja heilsu- og trygdarreglum, umframt ikki at rinda skatt og onnur gjøld. Eyka inntøkur verða skaptar við at krevja gjøld fyri starvssetan og skriva dýrar rokningar fyri útreiðslur sum t.d. amboð, flutning til arbeiðsplássið, innivist og mat. Hetta hevur við sær, at arbeiðstakarar setast í skuld og verða bundnir at arbeiðsgevaranum ella tí, ið dregur sær gagn úr arbeiðstakaranum.



Hvørjir eru vandarnir fyri útlendska arbeiðsmegi og hvussu er tránýtsla tongd at arbeiðsumhvørvinum?

ARBEIÐSTAKARAR VIÐ ÚTLENDSKUM UPPRUNA eru í størri vanda fyri at verða fyri tránýtslu. Hetta kemst m.a. av at teirra støða ofta er ótrygg og tey ikki kenna síni rættindi sum arbeiðstakarar. Tey kunnu tí koma í støður, har tey verða tránýtt, arbeiða í ótryggum ella vandamiklum umstøðum ella undir treytum, ið á annan hátt ikki samsvara við galdandi reglur og sáttmálar.

Arbeiðstakarar við útlendskum uppruna kunnu eisini, uttan at vera greið yvir tað, verða blivin skrásett sum sjálvstøðug vinnurekandi ella sum eigari av lítlari fyritøku, hóast tey í veruleikanum arbeiða sum vanligir løntakarar.



Lógarbrot tongd at arbeiðsumhvørvi og trygd, kunnu vera ein ábending um arbeiðstongdan kriminalitet og tránýtslu av arbeiðsmegi. Lógarbrotini kunnu vera partur av einum vinnuhátti, ið er grundaður á tránýtslu ella vera ábending um onnur brot.

Arbeiðstakarar við útlendskum uppruna kunnu, óansæð kyn ella vinnugrein, uppliva nógv ymisk sløg av tránýtslu og ringum arbeiðsumstøðum. Ofta er talan um órímiliga høg krøv, so sum tungt kropsligt arbeiði, høga arbeiðsferð, langar vaktir, fáar ella ongar steðgir, umframt avmarkaða frítíð, ið ofta førir til avbyrging frá samfelagnum. Í tílíkum førum hava arbeiðstakararnir vanliga lítlan møguleika at ávirka sínar arbeiðsumstøður.

Vandarnir eru ymiskir, alt eftir hvørja vinnugrein talan er um. Í vinnugreinum, har nógvir menn starvast, t.d. í byggivinnuni, kann trygdin vera í vanda, og orsakað av vantandi útbúgving, líkasælu um trygdarkrøv og ringum málsligum førleikum, økist hesin vandin. Í vinnugreinum, har flest kvinnur starvast, so sum í heilsuverkinum, á sosiala økinum og í hotell- og matstovuvinnuni, kann harumframt vera vandi fyri kynsligum ágangi og harðskapi.

Hvussu roynir man í Norðurlondum at handfara vandarnar?

NORÐURLONDINI NÝTA ymiskar hættir at hava eftirlit við og handfara sambandið millum arbeiðstrygd, vandar í arbeiðsumhvørvinum og tránýtslu av arbeiðsmegi. Hetta tí at tað er ymiskt, hvørjar heimildir og leiklutir eftirlitsstovnar og fakfeløg í londunum hava. Í Finnlandi hevur arbeiðseftirlitið heimild til at gera eftirlit við arbeiðsumstøðum og lønarviðurskiftum, meðan arbeiðseftirlitið í Noregi hevur heimild at gera eftirlit við arbeiðsumstøðum, men bert kann gera eftirlit við lønarviðurskiftum har almennir, víðkaðir sáttmálar eru galdandi. Í Svøríki og Danmark er heimildin hjá arbeiðsumhvørvismyndugleikunum í høvuðsheitum avmarkað til heilsu, trygd og umhvørvi. Ábyrgdin at fylgja upp uppá lønar- og arbeiðsviðurskifti liggur í størri mun hjá fakfeløgunum. Í Íslandi hava fakfeløg og eftirlitsmyndugleikar eitt formaliserað samstarv um eftirlit við arbeiðsviðurskiftum. Yvirskipaðu reglurnar hjá londunum um arbeiðstongdan kriminalitet, tránýtslu av arbeiðsmegi og heilsu og trygd hava tí stóran týdning fyri, hvussu eftirlitsarbeiðið verður skipað og framt í verki.

INTEGRATE verkætlanin

NORÐURLANDARÁÐIÐ HEVUR fíggjað INTEGRATE verkætlanina, sum er eitt samstarv millum HEUNI (European Institute for Crime Prevention and Control, knýtt at ST), norska Fafo-stovnin og universitetið í Lund í Svøríki. Verkætlanin hevur kannað sambandið millum arbeiðstongdan kriminalitet, vandar í arbeiðsumhvørvinum og tránýtslu av arbeiðsmegi í Norðurlondum út frá verandi gransking og serfrøðinga fokusbólkaorðaskifti. Við støði í hesum er ein frágreiðing gjørd, umframt eitt kunningarblað og ein eftirlitslisti til eftirlitsfólk, myndugleikar, fakfeløg og aðrar viðkomandi partar.

Sum liður í INTEGRATE verkætlanini eru eisini 12 stutt filmsbrot um góðar arbeiðshættir framleidd. Í filmsbrotunum verður greitt frá loysnum og framferðarháttum um, hvussu arbeiðstongdur kriminalitetur og tránýtsla av arbeiðsmegi kunnu handfarast og fyribyrgjast. Endamálið við filmsbrotunum er at varpa ljós á virknar arbeiðshættir og felags loysnir úr øllum Norðurlondum.

Sí filmsbrotini her →

Eftirlitslisti

Til at eyðmerkja vandar í arbeiðsumhvørvinum í sambandi við tránýtslu av arbeiðsmegi


EFTIRLITSFÓLK HAVA ein týðandi leiklut í arbeiðinum at kanna trygd og arbeiðsviðurskifti á arbeiðsplássum. Á eftirlitsvitjanum á arbeiðsplássum kunnu eftirlitsfólk eyðmerkja manglar í sambandi við trygd og heilsu umframt tekin um tránýtslu av arbeiðsmegi og arbeiðstongdan kriminalitet. Aðrir myndugleikar, sum til dømis skattamyndugleikar, heilsu- og brunainspektørar, eftirlitsfólk innan matvørutrygd og umboð fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum, kunnu eisini koma í støður, har tekin um tránýtslu eru.

Eftirlitsfólk og aðrir aktørar hava atgongd til arbeiðspláss, arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar. Hetta gevur teimum møguleika at eyðmerkja tekin um tránýtslu. Eftirlitsfólk kunnu eisini hjálpa arbeiðstakarum við útlendskum uppruna og øðrum arbeiðstakarum við at upplýsa teimum um teirra rættindi og ta hjálp, sum myndugleikar, fakfeløg og sjálvbodnir felagsskapir kunnu veita teimum. Harumframt hava hesir aktørar ein týdningarmiklan leiklut í at tryggja, at møgulig offur fyri tránýtslu verða víst víðari til røttu hjálpina.

Eftirlitsmyndugleikar kunnu seta í verk revistiltøk móti arbeiðsgevarum, ið fremja brot. Revsitiltøkini kunnu t.d. fevna um átalur, boð, bøtur ella at arbeiðið á einum øki verður steðgað. Somuleiðis kunnu aðrir myndugleikar, t.d. innan matvørutrygd og brunatrygd eisini seta revsitiltøk í verk.

Tað hevur stóran týdning, at eftirlitsfólk duga at eyðmerkja tekin um tránýtslu av arbeiðsmegi við at sameina ymiskar eygleiðingar, t.d. um trygd á arbeiðsplássinum, arbeiðstíð og um arbeiðsgevarin røkir sína lógarkravda skyldu. Hóast einstakar eygleiðingar kunnu tykjast sum lítil misbrot, so kunnu hesar tilsamans avdúka, um talan kann verða um tránýtslu av arbeiðsmegi. Neyðuga vitanin kann savnast inn umvegis samrøður við arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar umframt við at eygleiða atferð, útsjónd, sinnisstøðu og í hvønn mun grundleggjandi reglur um arbeiðsumhvørvi og trygd verða fylgdar.

Brot á heilsu- og trygdarviðurskifti á arbeiðsplássinum kunnu vera ein ábending um aðrar trupulleikar, so sum ov lága løn ella tránýtslu av arbeiðsmegi. Hesin eftirlitslisti er eitt amboð, sum kann brúkast til at eyðmerkja brot, sum kunnu vera tongd at tránýtslu av arbeiðsmegi.



INTEGRATE

Integrative approaches to labor exploitation and work-related crime: knowledge translation, transfer and exchange in the Nordic context

Nordic Council of Ministers

HEUNI

The European Institute for Crime Prevention and Control, affiliated with the United Nations

Fafo

Lund University

Sociology of Law Department

Faculty of Social Sciences

INNIHALDIÐ Í útgávuni endurspeglar einans sjónarmiðini hjá høvundunum og er teirra ábyrgd einans. Norðurlendska Ráðharraráðið átekur sær onga ábyrgd fyri nýtsluni av teimum upplýsingum, sum útgávan inniheldur.

Eftirlitslisti

HESIN EFTIRLITSLISTI er ætlaður eftirlitsfólki, pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og øðrum týðandi aktørum, soleiðis at hesi betur kunnu eyðmerkja brot á reglur um trygd og heilsu tongd at arbeiðstongdum kriminaliteti og tránýtslu av arbeiðsmegi.

1 Brot í sambandi við innleiðslu og upplæring

- ☐ **Manglandi upplæring** og kunning til arbeiðstakaran um heilsu og trygd á arbeiðsplássinum.
- ☐ **Manglandi kunning** um rætt til ráðgeving um arbeiðsumhvørvi, umframt hvør lógarásetti ráðgevin er.
- ☐ **Manglandi upplæring** og leiðbeining í at útinna arbeiðið á vandaleysan hátt.
- ☐ **Manglandi leiðbeining** um nýtslu av hóskandi arbeiðsklæðum, trygdarútgerð, persónligari verndarútgerð og handfaring av tólum og amboðum.
- ☐ **Arbeiðstakarar hava** ikki neyðugu førleikarnar til at avrika uppgávuna á heilsu- trygdarliga fylt forsvarligan hátt.

2 Manglar í sambandi við arbeiðstíð / brot / órøkt

- ☐ **Ov langir** arbeiðsdagar.
- ☐ **Manglandi skrivligar** arbeiðsætlanir og starvsfólk verða ikki kunnað í nóg góðari tíð um arbeiðsætlan sína.
- ☐ **Arbeiðsætlanin samsvarar** ikki við veruligu arbeiðsdagarnar, sum eru nógv longri og umfatar arbeiði um kvøldið, náttina og í vikuskiftinum.
- ☐ **Starvsfólkatal sambært** arbeiðstíðarætlanini samsvarar ikki við veruliga talið av arbeiðstakarum á arbeiðsplássinum.
- ☐ **Arbeiðstakarar fáa** ikki lógarásettar steðgir í arbeiðsdegnum.
- ☐ **Arbeiðstakarar fáa** ikki lógarásetta dagliga ella vikuliga hvílutíð.
- ☐ **Eingin álítandi** skrásetingarskipan av arbeiðstímum fyriliggur.
- ☐ **Manipulatión ella** falsan av tímaskrásetingum.
- ☐ **Óreglulig ella** óútroknilig vaktarskipan.
- ☐ **Áløgd vaktartænasta** ella tilbúgving uttan lønarsamsýning ella hvílutíð.
- ☐ **Eingir frídagar** ella feria.

3 Manglar við arbeiðsklæðum og trygdarútgerð

- ☐ **Arbeiðsgevari veitir** ikki neyðug arbeiðsklæði og trygdarskógvar, eiheldur klæðir og útgerð til serligar umstøður (hita og kulda) ella til handfaring av vandamiklum evnum.
- ☐ **Persónliga verndarútgerðin** (t.d. hjálmar, handskar, maskur, skógvar) verða ikki nýtt ella verða ikki rætt nýtt.
- ☐ **Persónliga verndarútgerðin** er ikki hóskandi til ítøkiligu vandarnar í arbeiðinum.

> **Vit hava sæð greið tekin um tránýtslu, tá ið arbeiðsklæðini ikki eru hóskandi. Tað er sera vanligt, at bólkar av undirveitarum ikki hava vetrarklæðir. Hetta sigur nakað um gjaldførið hjá fyritøkuni sum heild og hvussu nógv hon leggur í síni starvsfólk. Eftir mínum tykki kunnu manglandi arbeiðsklæðir vera eitt tekin um tránýtslu av arbeiðsmegi.**
>
> — Umboð fyri fakfelag í Finnlandi

4 Manglar í sambandi við skyldur arbeiðsgevarans

- ☐ **Arbeiðsgevari hevur** ikki lógarbundna arbeiðsskaðatrygging av arbeiðstakarunum.
- ☐ **Arbeiðsgevari rindar** ikki heilsuútreiðslur ella inntøkumiss orsakað av arbeiðsóhappum.
- ☐ **Arbeiðsgevari noktar** starvsfólki atgongd til heilsutænastur.
- ☐ **Arbeiðsgevari veitir** ikki lønta sjúkrafráveru.
- ☐ **Arbeiðsgevarar senda** starvsfólk heim aftur til land sítt beint eftir arbeiðsóhapp.

5 Brot og manglar í sambandi við heilsu og trygd á arbeiðsplássinum

- ☐ **Manglandi handfaring** av vandamiklum ella heilsuskaðiligum arbeiðsumstøðum, so sum handfaring av dusti ella asbesti.
- ☐ **Útgerð er** vandamikil og manglar viðlíkahald.
- ☐ **Manglandi vegleiðing** í tryggari nýtslu av arbeiðsútgerð og amboðum.
- ☐ **Arbeiðsútgerð verður** nýtt út um trygdaravmarkingar.
- ☐ **Ótryggir byggipallar,** stigar ella høgir arbeiðspallar.
- ☐ **Hál gólv,** órudd á gonguvegum ella blokeraðar neyðdyr.
- ☐ **Ótryggur flutningur** til arbeiðsplássið og nýtsla av óhóskandi akførum.
- ☐ **Eingin skipað** mannagongd til fráboðan av trygdarbrekum ella óhappum.
- ☐ **Revsiatgerðir móti** starvsfólki, sum fráboða vandamiklar arbeiðsumstøður.
- ☐ **Brot á** trygd verða ikki tikin til viðgerðar ella bøtt um.

> **Vit hava havt nakrar útlendskar arbeiðstakarar, ið hava fingist við at taka niður asbest uttan at nýta masku ella annað slag av persónligari verndarútgerð.**
>
> – Umboð fyri ein felagsskap, Finnland

6 Manglar viðvíkjandi bústaðinum hjá arbeiðstakaranum


- ☐ **Tekin um** búseting á arbeiðsplássinum (til dømis ein madrassa á gólvinum í bakrúmi á einari matstovu).
- ☐ **Vánalig og** trong bústaðarviðurskifti, sum arbeiðsgevarin hevur útvegað.
- ☐ **Eingir vesi** ella vaskimøguleikar, t.d. í árstíðarbundnum arbeiði í landbúnaði.
- ☐ **Vakmyndatól ella** onnur eftirlitsútgerð í bústaðnum.
- ☐ **Órímiliga høgur** leiguprísur samanborið við vanliga leigustøðið í økinum.

> **Sum liður í einum eftirliti fari eg eisini niður og hyggi at bústaðarviðurskiftum teirra, um arbeiðstakararnir geva loyvi til tað. Tá eg komi niður í kjallaran og síggi, at her liggja madrassur og seingjarklæði, eitt køliskáp og ein mikroovnur ella riskókari, so kann man væl byrja at spyrja: 'Nú ja, hvussu langar arbeiðsdagar hava tit?**
>
> – Eftirlitsfólk, Finnland

7 Tekin um ringt sálarligt arbeiðsumhvørvi

- ☐ **Tekin um** at arbeiðstakarar eru útlúgvaðir, so sum støðug møði ella hava trupulleikar við at hugsavna seg.
- ☐ **Ótti ella** ræðsla, serliga í nánd av myndugleikum ella eftirlitsfólki.
- ☐ **Tunglyndi ella** undanhald, t.d. sosial avbyrging.
- ☐ **Snarsinni ella** skiftandi kenslur, ið kunnu koma til sjóndar sum svingandi sinnalag.
- ☐ **Arbeiðstakarar geva** til kennar vónloysi ella avmarkaða ávirkan á egin viðurskifti, t.d. við at siga, at viðkomandi ikki kann siga starvið frá sær ella betra sína støðu.
- ☐ **Likamlig eyðkenni** tongd at strongd, so sum høvuðpína, magatrupulleikar ella pína uttan greiða orsøk.
- ☐ **Arbeiðstakarar halda** seg aftur frá at tosa frítt, møguliga orsakað av ótta fyri hevnd ella eftirliti frá arbeiðsgevara ella fólki umboðandi arbeiðsgevaran.
- ☐ **Tekin um** tvingsil ella treytabundna støðu, so sum at nevna skuld, afturhildin skjøl ella hóttanir.

NEVNDU EYÐKENNI og eygleiðingar merkja ikki neyðturviliga, at talan er um tránýtslu av arbeiðsmegi, men tey vísa, at ávísir manglar ella brot eru viðvíkjandi trygd og heilsu á arbeiðsplássinum – serliga í vandafullum vinnugreinum, har útlendsk arbeiðsmegi er – og at neyðugt er at vísa hesum ans. Einstakir manglar, brot ella vansketni kunnu vera tekin um meira víðfevnda og skipaða tránýtslu av útlendskari arbeiðsmegi ella enntá menniskjahandil.



Onnur tekin um tránýtslu av arbeiðsmegi

- **Arbeiðstakarar greiða** frá, at tey fáa ov lítið í løn, trupulleikum við lønarútgjaldingum ella kunnu ikki greiða frá, hvussu nógv tey fáa í løn.
- **Arbeiðstakarar greiða** frá, at tey hava goldið fyri at fáa starvið ella fyri neyðugt arbeiðs- og uppihaldsloyvi, ella at tey eru noydd at rinda ein part av lønini aftur til arbeiðsgevaran.
- **Arbeiðstakarar hava** ikki setanarsáttmálar, ella sáttmálin er á einum máli, sum tey ikki skilja.
- **Arbeiðsgevarin svarar** øllum spurningum fyri arbeiðstakaran og gevur ikki arbeiðstakaranum loyvi at tosa.
- **Á arbeiðsplássinum** eru arbeiðstakarar, sum sambært arbeiðstíðarætlanini ella arbeiðstíðunum eiga at hava frí.
- **Arbeiðsgevarin hevur** samleikaskjøl hjá arbeiðstakarum í varðveitslu.
- **Arbeiðstakarar vita** ikki nágreiniliga, hvar arbeiðsplássið ella bústaðurin er staðsettur.
- **Arbeiðstakarar greiða** frá, at tey eru villleidd ella hótt av arbeiðsgevaranum.
- **Arbeiðsgevarin forðar** arbeiðstakarum í at lima seg inn í fakfelag.

Hvat skal man gera, um man varnast tekin um trupulleikar í arbeiðsumhvørvinum ella tránýtslu av arbeiðsmegi?

- **Kunna arbeiðstakararnar** um teirra rættindi og tøkar tænastur. Hetta kann gerast við at býta út faldarar, telefonnummur og kunning frá fakfeløgum ella felagsskapum. Tað er best um kunningin er á móðurmálinum hjá viðkomandi og verður givin í ymsum formati, soleiðis at viðkomandi kann seta seg í samband seinni.
- **Um orsøk** er til at halda at arbeiðstakarar kunnu vera offur fyri menniskjahandli, skal – við samtykki teirra – teimum verða víst á serlig hjálpartiltøk í samsvari við føroysku reglurnar.
- **Síggj altíð** til at útlendskir arbeiðstakarar, sum arbeiða uttan arbeiðsloyvi, ikki verða vístir av landinum, áðrenn staðfest er, at tey ikki eru offur fyri menniskjahandli ella ikki eru fyri arbeiðstránýtslu. Arbeiðstakarar í tílíkum støðum kunnu hava rætt til eina umhugsanartíð ella aðrar møguleikar fyri uppihaldsloyvi, ella til endurgjald og/ella útgjald av ógoldnum lønum.
- **Trýst ikki** arbeiðstakarar til at tosa, um tey tykjast bangin. Tey kunnu óttast, at onkur hoyrir tað, tey siga um trupulleikar, tey hava upplivað á arbeiðsplássinum. Syrg fyri at samrøðan verður hildin á einum tryggum stað. Nýt opnar spurningar, og um tit ikki tosa felags mál, syrg so fyri tulking umvegis telefon ella nýt vitlíkisamboð til at umseta.
- **Tak myndir** ella filmsbrot, skráset brot og fráboða samsvarandi mannagongdum og vegleiðingum hjá tínum stovni. Um illgruni er um revsiverda atferð, set teg í samband við løgregluna. Boða eisini øðrum viðkomandi myndugleikum frá.
- **Tá ið** tað er møguligt og er innan fyri heimildirnar hjá eftirlitsmyndugleikanum, skulu revsitiltøk setast í verk móti arbeiðsgevarum, sum fremja lógarbrot. Hetta kann fevna um átalu, boð, bót ella aðra fyriskipan samsvarandi við føroyska lóggávu.

Í neyðstøðu, ring 1-1-2

Ráð til støður, har tú varnast møguliga tránýtslu av arbeiðsmegi

- ☐ **Tak støði** í ofrinum. Far virðiliga við arbeiðstakaranum. Eygleið, lurta og ver tolin.
- ☐ **Minst til,** at tað ofta er torført hjá teimum, sum eru fyri arbeiðstránýtslu, at siga frá um sínar upplivingar. Tað hevur týdning, at tú livir teg inn í støðuna hjá arbeiðstakaranum, byggir upp álit og tryggjar, at eingin annar hoyrir samrøðuna tykkara millum.
- ☐ **Tryggja tær** at tit skilja hvønn annan. Um tørvur er á tulki, vel tá ein persón, sum er óheftur og álítandi. Nýt ongantíð arbeiðsgevaran ella ein annan arbeiðstakara sum tulk.
- ☐ **Spyr einfaldar** og opnar spurningar fyri at eyðmerkja møguligar manglar í sambandi við setan, arbeiðsumstøður ella onnur viðurskifti.
- ☐ **Greið altíð** arbeiðstakarunum frá, hvat upplýsingar frá viðkomandi verða nýttar til, hvussu upplýsingarnar verða handfarnar og hvørjar møguligar uppfylgjandi handlingar kunnu verða.

Meiri lesitilfar

RUFFARÍ OG MENNISKJAHANDIL. Føroya Politi.

MATERIALER. Center mod Menneskehandel.

OM MENNESKEHANDEL. Center mod Menneskehandel.

INDIKATORER. Et redskab til at opspore menneskehandel.

RÅD OG VEJLEDNING. Til dig, der arbejder med personer udsat for menneskehandel.

UKRAINSKE FORDREVNE kan blive udsat for menneskehandel.

REPORT SERIES №109: "From rights on paper to rights in action" – Exploited migrant workers' access to remedy in the Baltic Sea Region | Heuni.

REPORT SERIES № 95A: Uncovering labour trafficking. Investigation tool for law enforcement and checklist for labour inspectors | Heuni.



Samband

- **Arbeiðs- og brunaeftirlitið.** +298 664400, arb@arb.fo
- **Útlendingastovan.** +298 357979, info@utlendingastovan.fo
- **TAKS.** +298 352600, taks@taks.fo
- **Reyði krossur.** +298 283630, redcross@redcross.fo
- **Rættarhjálpin.** +298 319823, post@raettarhjálpin.fo
- **Føroya Politi.** +298 351448

Arbeiðs- og brunaeftirlitið
FAROESE SAFETY AUTHORITY